# oljuklæðini í Sveis



*Økið úti í Grøv ikki heilt ómeinlíkt alpukendana Sveis, har tey fimm skulu vera komandi árini.*

tað var nýggja starvið. At fáa boðið búskaparstarv hjá altjóða oljufyritøku í Sveis vigaði tyngri.

## Gott at fara burtur

Tummas Pauli Mýri telist millum teirra, ið halda, at ungir føroyingar, sum eru mobilir og hava lætt við at fóta sær í nýggjum umhvørvi, eiga at taka av slíkum avbjóðingum, tí tað kann vera eitt sera gott grundarlag at koma heimaaftur til eina møguliga føroyska oljuvinnu.

Oljufelagið Lundin Petroleum arbeiðir í nógvum londum, í Afrika og í Asia men eisini í Norðsjónum, har tað herfyri fekk leitiloyvi saman við ongum øðrum enn Faroe Petroleum. Spurdur um hetta kennskapið og samstarvið kann draga Lundin til Føroyaøkið eisini vil Tummas Pauli treyðugt svara, tí hann er so nýggjur. Vit loyva okkum tó at gita, at møguleiki átti at verið fyri, at eitt nú Lundin kann farma, keypa seg inn í leitiloyvið hjá Eni og Faroe Petroleum, har borast skal eftir olju í 2008. Teitur Poulsen, sum hevur verið hjá Lundin í eina tíð, arbeiddi fyrr hjá Faroe Petroleum. Kanska henda føroyska "connection" kann skunda yndir, at slík oljufeløg sum Lundin fara at vísa Føroyaøkinum ans. Bara tíðin fer at vísa, um felagið hjá Teiti og Tummas Paula fer at gerast uppaftur meira "føroyskt".

## Stórar uppgávur

Uppgávurnar hjá Tummas Paula verða so fyrst og fremst at kanna møguleikarnar hjá Lundin í nýggjum leitiøkjum, í hvønn mun felagið skal keypa seg inn í oljukeldur kring um heimin og síðani at vera við til at byggja oljufelt út. Ein uppgáva hann eisini var partur av hjá Shell og BP.

Tummas Pauli dylur ikki fyri, at ætlanin hjá honum og familjuni er at koma heimaftur ein dag, og ongantíð betur um tað so er at vera partur av eini komandi føroyskari oljuvinnu. Finna vit olju, hvat Tummas Pauli ikki ivast í, so er gott at fáa føroyingar, sum hava fingið sær vitan og royndir í útlendskari oljuvinnu, heim til hesa vinnu.

Annars heldur Tummas Pauli tað vera bæði sunt og gott fyri føroyingar eisini at taka við avbjóðingum úti í verð, ikki minst nú vit eru partur av altjóðaøkinum. Børnini kunnu eisini fáa gott í beinið av hesum. So tað ræður um at troyta møguleikarnar, meðan teir eru har.